# Mugu fylgja oddinum



*Í fjør vann Skála greiðan sigur á HB í fyrsta umfarinum av landskappingini. Og vónin er uttan iva, at teir við einum tilsvarandi sigri kunnu skræða seg leysar í oddastríðnum*

Bæði Skála og HB máttu hósdagin taka til takkar við tapi í 1/4-finaluni í kappingini um Løgmanssteypið. Einki er at ivast í, at hetta hevur tikið fast í sjálvsálitið hjá báðum liðum, men tey sleppa ikki at vena seg leingi.

Dysturin sunnudagin er fyri báðar partar sera týðandi, og fyribils í øllum førum ger hann av, hvør av pørtunum framhaldandi kann rópa seg oddalið.

Hjá Skála er í løtuni ivamál um tveir leikarar. Jenel Gorgunaru og Bjarni Jørgensen hava báðir verið skaddir, men vónin er, at teir báðir eru tøkir sunnudagin.

Hjá HB tykjast allir spælarar vera tøkir. Heine Fernandez hevur skift seg sjálvan inn teir báðar seinastu dystirnar, og so er spurningurin, um hann hesaferð verður við frá fyrsta bríksli.

**-jm**

# Tølini tala

| | 04 | 03 | 02 | 01 | 00 | 99 | 98 | 97 | 96 | 95 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Skála-HB | 3-1 | 1-3 | 0-3 | - | - | - | - | - | - | - | 1-0-2 | 4-7 |
| B36-GÍ | 0-2 | 4-0 | 2-3 | 3-1 | 3-1 | 4-0 | 1-1 | 5-2 | 0-0 | 0-2 | 5-2-3 | 22-12 |
| NSÍ-VB | 1-1 | 4-0 | 1-0 | 1-1 | 4-0 | 1-0 | 4-1 | 1-4 | - | 0-3 | 5-2-2 | 17-10 |
| TB-KÍ | - | - | 1-3 | - | - | - | 0-4 | - | 1-1 | 2-2 | 0-2-2 | 4-10 |
| EB/S-ÍF | 7-0 | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 1-0-0 | 7-0 |

*Bæði B36 og NSÍ hava havt yvirtakið, tá tey hava tikið móti ávíkavist GÍ og VB seinastu árini. Nakra heilt greiða ábending um útfallið sunnudagin geva hagtølini tói kki í nøkrum førum, og hvussu er og ikki, so skulu dystirnir væl saktans spælast, áðrenn stigini verða býtt. Talvan sýnir, hvussu tað hevur gingist, tá mótstøðuliðini sunnudagin hava hitst í tilsvarandi uppgerðunum seinastu tíggju árini.*

**-jm**

## Toppur móti botni

B36 er oddalið og GÍ botnlið, men fyri tað er ikki víst, at gøtumenn bara fara at geva seg uttan víðari sunnudagin.

Hjá B36 tykist venjarin hava ein positivan trupulleika, nú Kenneth Jacobsen aftur er tøkur. Tað kann leggja upp til, at verjan verður umskipað, men nýggja samansetingi við Fróða Benjaminsen í miðverjuni hevur riggað sera væl seinastu dystirnar. Hinvegin hevur Eyðun Højgaard ligið sjúkur alla vikuna, og tí er væl hugsandi, at nýggjur maður skal finnast til plássið á vinstra veingi.

Hjá GÍ fekk Hans Pauli Samuelsen tvær ferðirnar gult kort í 1/4-finaluni móti Skála, og hann verður tí ikki á liðnum, sum fer á vøllin í Gundadali.

**-jm**

## Vilja halda um góðu støðuna

Hóast fuglfirðingar í fjør løgdu rygg til eyðmýkjandi stórtap á Mølini, so man sjálvsálitið hjá liðnum vera í topp, nú teir aftur vitja EB/Streym.

Góða støðan á stigatalvuni saman við hálvfinaluplássinum í steypakappingini hava prógvað, at ÍF ikki bara er at kimsa at í ár, og fáa teir aftur fult hesaferð, fer tað av álvara at lukta av metalli.

Og fuglfirðingar rokna við, at allir mans eru tøkir sunnudagin, og so er spurningurin bara, hvussu Petur Simonsen fer at blanda kortini hesaferð.

Hjá EB/Streymi er talan í løtuni um lítlan niðurtúr, og skulu teir fara at klintra uppeftir, skulu stig helst á kontina nú.

Til dystin sunnudagin eru helst allir mans tøkir. Johan á Stongum var ikki við, tá teir vitjaðu hjá HB seinasta sunnudag, men hann hevur vant í vikuni, og er tí helst tøkur.

**-jm**

## Hagtølini siga útisigur

Meðan vágbingar í ár hava staðið seg væl á útivølli, hevur úrtøkan hjá NSÍ heima ikki verið nakað at reypa av. Tí tala hagtølini kanska fyri einum útisigri við Løkin, men í Runavík siga tey so fara eftir øllum stigunum kortini.

Til dystin hesaferð eru Kári Hansen, Áki L. Hansen og Gert Langgaard ikki tøkir hjá Trygva Mortensen. Hinvegin eru Ikechukwu Onyema og Sjúrður Jacobsen báðir tøkir, eftir at teir vóru úti við skaða seinast.

Hjá VB verður roknað við, at allir mans eru tøkir, og so er spurningurin, hvørt teir aftur hesaferð megna at halda fast um góðu avrikini á útivølli.

**-jm**

## Nýggi venjarin skal roynast

Einki er at ivast í, at klaksvíkingar eru spentir um, hvussu fer at gangast á Sevmýri sunnudagin. Við nýggjum manni við stýrisvølin verður kravið helst, at vánaliga gongdin skal vendast, soleiðis at talan ikki verður um fjórða ósigurin á rað.

Einasta ivamálið til dystin hesaferð er Leon Bjartalíð, sumk hevur havt ein skaða í fótinum. Hann hevur ikki fingið vant við fullari ferð í vikuni, men roknað varð tó við, at hann kann verða pjøssaður saman til dystin sunnudagin.

Hjá TB glapp vónin um ein sess í ólavsøkufinaluni, tá teir taptu fyri B71 kristi himmalferðardag. Í landskappingini hava teir tó staðið seg sera væl á heimavølli, og tí er einki at ivast í, at teir ætla sær øll stigini, nú KÍ kemur á vitjan.

-jm